TILBÚGVINGARSTOVNURIN



# STJÓRI TIL TILBÚGVINGARSTOVN FØROYA

Stjórin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av, at tilbúgvingarøkið undir Fiskimálaráðnum, og samskipanin hesum viðvíkjandi, virkar á ein tryggan hátt.

**Høvuðsuppgávur**
Leiða og samskipa arbeiðið á Tilbúgvingarstovninum, herundir

- at samskipa og greina raðfestingar og verkætlanir og gera meginsetningar millum starvsøkini undir brunaumsjónini, sjóbjargingarstøðini (MRCC) og onnur tilbúgvingarøki
- at seta í verk tilbúgvingarlig menningartiltøk, eitt nú skipaða førleikamenning fyri útinnandi partarnar í tilbúgvingini, í samstarvi við brunaumsjónina og sjóbjargingarstøðina
- at umsita játtanir mótvegis miðfyrisitingini
- at evna til uppskot til lógir og kunngerðir innan tilbúgvingarøkið
- at veita Fiskimálaráðnum ráðgeving í tilbúgvingarmálum
- at samstarva um tvørgangandi uppgávur í Fiskimálaráðnum

**Almenn førleikakrøv**

- Útbúgving frá lærdum háskúla ella útbúgving og royndir, ið kunnu javnsetast við hetta
- Viðkomandi leiðsluroyndir
- Starvsroyndir ella kunnleika til tilbúgvingarøkið
- Góð evni at samskifta, bæði munnliga og skrivliga, á føroysum, donskum og enskum máli
- Góð samstarvsevni og evni at fyriskipa
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt ájavnt 37. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, tó uttan at vera tænastumannastarv.

Starvsheitið er stjóri og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran í Fiskimálaráðnum.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin verður Tilbúgvingarstovnur Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu sendast Fiskimálaráðnum, Rógva Reinert, aðalstjóra, Postboks 347, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 1. mai 2008.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Rógva Reinert, aðalstjóra, á tel. 353030.

*Tilbúgvingarstovnurin fevnir um Sjóbjargingarstøðina (MRCC-Tórshavn), Neyð- og Trygdartænastuna, Tilbúgvingarsamskipanina og Brunaumsjón Landsins. Í løtuni starvast tilsamans 21 fólk á stovninum.*

**www.fisk.fo**

# Starvsfólk til søludeildina

Søkt verður eftir fólki til søludeildina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**

- bílegging av ferðaseðlum og pakkatúrum
- telefontænasta/vegleiðing
- help-desk tænastur
- leiðbeining í sambandi við netbókingar

**Førleikakrøv:**
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur

- útbúgving ella royndir innan skrivstovuyrkið
- hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu
- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Vit bjóða eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi seinasta lagi 30 apríl 2008. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Heidi Askham (Søludeildin), tlf. 34 10 10, heidia@atlantic.fo

**Umsókn skal sendast til:**
Atlantic Airways, Starvsfólkadeildin (Human Resources), Att.: Georg Suðurgarð Vága floghavn, 380 Sørvágur, ella til georg@atlantic.fo.

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 250 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2007 var 539 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur sjey flogfør og fýra tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi, Noregi og Svøríki. Harumframt er virksemið viðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo